## Skaldsøga um bygdarmenning

ÚTGÁVUR
*Rúna Sivertsen*




Klakvíkingurin, Andras Miðskarð, hevur á egnum forlagi givið út skaldsøguna, “Bygdarmenning”.

- Skaldsøgan má sigast at vera realistisk og leggur upp til nýggjar avbjóðingar, um at satsa, tora og vilja, sigur høvundurin í tíðindaskrivi.

Skaldsøgan, “Bygdarmenning”, er um unglingin, Tórhall, sum setir sær fyri at bjarga heimbygd síni undan at doyggja út.

Bygdin, Selnes, eins og aðrar bygdir í útjaðaranum, er merkt av at missa sítt besta fólk vegna vantandi arbeiði.

Tórhallur setir sær tí fyri - við Guds hjálp - at venda hesi skeivu gongd.

Tað eydnast Tórhalli saman við øðrum góðum kreftum at gera dreymarnar um burðardygga menning til veruleika. Hvussu hetta verður gjørt, lata vit lesaran sjálvan at finna útav.

Bókin, sum telur 115 blaðsíður, kostar kr. 200, er at fáa í øllum bókabúðum kring landið og hjá forlagnum.

Í tíðindaskrivinum verður sagt, at bert ein skaldsøga er útgivin í Norðoyggjum áður. Tað er skaldsøgan, “Dælt er manni vitandi orð”, sum Óli Dahl, sáli, gav út í 1988.

Sosialurin ynskir Andrasi Miðskarð tillukku við avrikinum og góða eydnu framyvir.

## Tveir brotnar rútar

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið hava verið smærri herverk í býnum. Tvey av teimum umfata brotnar rútar. Ein rútur var fríggjakvøldið brotin hjá Sirri á Áarvegnum í Havn, og leygarnáttina var ein annar rútur brotin í Sethúsasøluni.

Politiið hevur um vikskiftið verið tvær ferðir úti til húsaófrið. Harafturat hava tveir persónar sovið rúsin av sær í brummuni, og leygarmorgunin var ein, sum hevði fingið ein frammaná í býnum.

Annars sigur politiið í Havn, at tað hevur verið ógvuliga friðarligt um vikuskiftið.

## Ungur drongur mist fingrar

ARBEIÐSÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjamorgunin var eitt arbeiðsóhapp í eini smiðju í Klaksvík. Talan var um ein ungan drong, sum hevði fingið hondina í klemmu í eini maskinu. Fingrarnir vórðu kroystir, og drongurin varð sendur niður á Ríkissjúkrahúsið sama dagin, tí læknarnir í Føroyum vistu ikki, um drongurin misti fingrarnar ella ikki.

– Drongurin, sum er 15 ára gamal, hevur verið ógvuliga óheppin. Hann var í starvsvenjing í smiðjuni, sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík.

## Ferðsluóhapp í Klaksvík

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygarkvøldið um tíggjutíðina var eitt ferðsluóhapp í Klaksvík. Talan var um tveir bilar, sum báðir koyrdu sama veg, sum rendu saman.

Maðurin í aftara bilinum var ávirkaður av rúsdrekka, so tá bilurin frammanfyri bremsar, fær bilurin aftanfyri ikki steðga.

Maðurin varð tikin inn á politistøðina, har blóðroynd varð tikin, og maðurin verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

# Musikkur er upplýsing í tónum



*Tað eru 1427 musikkskúlanæmingar í Føroyum, ið spæla sum einstaklingar, umframt tey, sum spæla í bólki. Her spælir 5 ára gamla Súsanna Thomsen fiól fyri luttakarunum á ráðstevnuni hjá Trivnaðar- og heilsuráðnum í Norðurlandahúsinum herfyri*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

**Hetta sigur Martin Mouritsen, musikkskúlastjóri. - Kanningar vísa, at tá børn sleppa at spæla ljóðføri, mennast tey skjótari og læra betur, sigur hann**

TÓNLEIKUR OG MENNING
*Rúna Sivertsen*

Leygardagin endurgóvu vit úr grein í Politikken, har m.a. verður víst á, at tónleikur hevur positiva ávirkan á innlæringarevnini hjá børnum.

Til hetta sigur Martin Mouritsen, musikkskúlastjóri, at royndir hava verið gjørdar, t.d. í Kanada, sum vísa tað sama.

Eftir eina 7 mánaða royndartíð, har børnini skuldu spæla eitthvørt ljóðføri, vóru týðilig framstig at síggja.

Tey børn, ið einki ljóðføri spældu, vóru á sama støði, sum frammanundan.

- Eisini í Føroyum hava vit góðar royndir, tá børn sleppa at spæla ljóðføri, sigur Martin.

- Tá tú spælir, verður heilin ógvuliga nógv stimbraður, tí neyðugt er at nýta fleiri sansir í senn, sigur hann.

Hann sigur, at hann veit dømi um ein flokk, har øll børnini spældu ljóðføri. Eftir eitt ár, var flokkurin, sum annars hevði verið ein trupul flokkur, fullkomiliga broyttur.

Onkustaðni eru lærarar farnir at nýta tónleik at sissa børnini við eftir spælið í fríkorterinum. Tað vísir seg, at tónleikur, fáar minuttir í byrjanini av tímanum, økir um konsentratiónsevnini.

- Málið hjá musikkskúlanum er at bróta sosiala arvin, við at øll børn skulu fáa høvi at spæla, sigur Martin Mouritsen at enda.

# Fundur um fiskivinnu á Svangaskarði

**Mikukvøldið komandi skipar valfelag Sambandsfloksins í Eysturoy, Samhald, fyri almennum fundi á Svangaskarði um fiskivinnuna**

POLITISKUR FUNDUR
*Tíðindaskriv*

Umframt løgtingsumboð floksins í Eysturoy, fer Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, at greiða frá um fiskivinnuna í Føroyum, og Egil Olsen, stjóri á Faroe Marine products fer at hava eitt innlegg um alternativar vinnumøguleikar. Eisini Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni verður við á fundinum. Hann fer at greða frá um útlitini hjá fiskivinnuni í framtíðini.

Í farnu viku bórust tíðindi um, at gróðurin á landgrunninum er dottin niður á sama botnstøði, sumhann var í 1990. Fiskivinnan er høvuðsgrundarlagið undir føroyska búskapinum, og tí kann hetta fáa stóra ávirkan á alt tað føroyska samfelagið.

Á heystfundi Sambandsfloksins, sum var 2. november, varð nógv gjørt burturúr, at útbúgvingar, sum kunnu takast í Føroyum, samsvara ikki við tey arbeiði, sum føroyingar kunnu velja eftir lokna útbúgving.

Hesi og onnur viðurskifti verða viðgjørd á fundinum á Svangaskarði mikukvøldið, og fyrireikararnir rokna við einum áhugaverdum og viðkomandi fundi.

Samhald hevur fyrr í heyst skipað fyri einum almennum fundi um yvirtøkuna av fólkakirkjuni, og var eisini við til at skipa fyri fundi um fíggjarlógaruppskotið fyri 2003. Ætlanin er seinni í vetur at hava fleiri fundir við ymiskum spennandi evnum, sum ætlandi verða hildnir ymsastaðni í Eysturoynni.



UTTAN ÚR HEIMI

# Eysturríksku veljararnir góvu Jørg Haider sekkin

**Víðgongdi Frælsisflokkurin fekk ein rættiligan frammaná á valinum í Eysturríki sunnudagin, og fyri fyrstu ferð í 36 ár er tann konservativi flokkurin nú tann størsti í landinum**

EYSTURRÍKI
*Árni Joensen*

Valúrslitið í Eysturríki sunnudagin kann tulkast eum ein nýggjur eysturrískur boðskapur til hin partin av Evropa. Á valinum í 1999 fekk tann víðgongdi høgraflokkurin Frælsisflokkurin so stóra undirtøku, at hann kom í stjórn. Tað hóvaði ikki hinum ES-londunum, sum settu tiltøk í verk ímóti Eysturíki.

Men sunnudagin varpaðu eysturríksku veljararnir Frælsisflokkin og leiðara hansara, Jørg Haider, á dyr. Flokkurin misti tveir triðingar av sínum veljarum, og so stóran ósigur hevur eingin politiskur flokkur í Eysturríki havt síðani seinna heimsbardaga. Men valið setti eisini eitt annað met. Konservativi flokkurin hjá Wolfgang Schússel, kanslara fekk so stóra framgongd, sum eingin annar flokkur hevur havt í sama tíðarskeiði, og fyri fyrstu ferð í 36 ár er flokkurin nú tann størsti í landinum.



*Wolfgang Schüssel*

*Mynd: Reuters*

Valið gav konservativa flokkinum 42,3 prosent av atkvøðunum (+15,4), sosialdemokratunum 36,9 prosent (+3,8), Frælsisflokkinum 10,2 (-16,7) og Teimum Gørnu 9,0 prosent (+1,6).

Úrslitið ber í sær, at Wolfgang Schússel hevur næstan frítt at velja, hvønn flokk hann vil hava í samgongu við sær. Hann kann halda fram saman við Frælsisflokkinum, men ger tað neyvan. Hann kann eisini velja sosialdemokratarnar og hevði tá valt ta samgongu, sum flestu eysturríkarar fegnir vilja hava, og at enda kann hann velja at fara í samgongu við Teimum Grønu. Hetta seinasta er ikki óhugsandi, tí Wolfgang Schússel ber orð fyri at hava dirvi til at royna tað, sum eingin væntar.

### Hvat við Haider?

Spurningurin er so, um tann stóri ósigurin fer at gera enda á politiska skeiði Jørg Haiders, men flestu eygleiðarar tykjast vera á einum máli um, at hann er ikki tann, sum letur seg teppa av einum valósigri.

So seint sum fyri einari viku síðani segði Haider, at hann ætlar at halda fram við royndunum at samskipa eina felags evropeiska høgrarørslu, sum skal stilla upp til tey ymsu ES-valini.

Undir valstríðnum hesaferð var útlendingapolitikkurin høvuðsmálið hjá Haider og Frælsisflokkinum, men valið vísti, at tað er ikki har, hann kann vænta sær stuðul. Hann var eisini ímóti at taka londini í Eysturevropa upp í ES, men fekk heldur ikki undirtøku fyri tí. Spurningurin er so, um hann fer at finna okkurt annað mál til næstu ferð.

# Keglast um oljudálking

**Portugisar vilja vera við, at olja er farin at renna úr tangunum á "Prestige". Nei, siga spaniumenn**

UMHVØRVISDÁLKING
*Árni Joensen*

Portugisisku myndugleikarnir boðaðu sunnudagin frá, at olja var farin at renna úr tangunum á tangaskipinum "Prestige", sum sakk úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini í síðstu viku.

Eitt portugisiskt rannsóknarflogfar var sunnudagin á leiðini, har skipið sakk góðar hundrað fjórðingar úr landi, og sambært manningini á flogfarinum var nógv olja at síggja á sjónum. Manningin vildi eisini vera við, at olja kom støðugt upp í vatnskorpuna, og at leki tí var komin á tangarnar.

Men hetta avsannaðu sponsku myndugleikarnir seinni. Mariano Rajoy, varaforsætisráðharri segði, at eingin olja er komin úr skipinum, síðani tað sakk seinasta týsdag. Sambært spaniumonnum vóru 11.000 tons likin úr tangunum, tá skipið sakk, men umhvørvisverndarfelagsskapir ivast í hesum talinum. Teir vilja vera við, at minst 20.000 tons runnu úr tangunum, áðrenn "Prestige" fór til botns.

Seinastu dagarnar hava fleiri hundrað sjálvboðin hjálpt myndugleikunum at taka olju upp í fjøruni á sponsku útnyrðingsstrondini.

# Biðja Bush fyribyrgja kríggi

**Meiri enn 300 politikarar og felagsskapir úr øllum heiminum vilja hava amerikanska forsetan at forða fyri kríggi við Irak**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Tey, sum hava skrivað undir áheitanina á George W. Bush, forseta, eru fólk fyri friði, umhvørvisverndarfólk og -felagsskapir og fólk og felagsskapir, sum eru ímóti kjarnorkuvápnum.

Í brævinum mæla tey USA til at beina fyri sínum egnu kjarnorkuvápnum, áðrenn landið krevur, at onnur lond skulu beina fyri sínum hópoyðingarvápnum.

- Heimurin kann ikki góðtaka, at USA, Russland, Kina, Bretland, Frakland, India, Pakistan og Ísrael hava kjarnorkuvápn, stendur í brævinum til amerikanska forsetan.

- So leingi hesi londini hava kjarnorkuvápn, fara onnur lond at royna at útvega sær tey, stendur at enda í brævinum.

## Kvettmaður forseti

Lucio Guiterrez varð sunnudagin valdur til forseta í suðuramerikanska landinum Ekvador. Hann fekk 54,3 prosent av atkvøðunum, meðan mótvalevnið, ríkmaðurin Alvaro Noboa, fekk 45,6 prosent.

Tann vinstrasinnaði Lucio Guiterres hevði ein virknan lut í kvettinum, tá herurin koyrdi tann fólkavalda forsetan Jamil Mahuad frá fyri tveimum árum síðani. Hann gongur altíð í hermannabúna og verður á manna munni róptur "Obersturin".

Undir valstríðnum lovaði tann 45 ára gamli Guiterrez at bøta um viðurskiftini hjá teimum fátæku í Ekvador, eins og hann lovaði at geva landsins indiánum betri umstøður. 12 milliónir fólk búgva í Ekvador, og hildið verður, at tveir triðingar liva í fátækradømi.

## 220.000 børn í vanda

Búskaparkreppan í Argentina hevur rakt fólkið meint, og sambært einari nýggjari frágreiðing líða nógv børn av, at tey fáa ov lítið at eta, ella at maturin er ov vánaligur.

Frágreiðingin sigur, at hvønn dag doyggja trý argentinsk børn, tí tey hava fingið ov vánaligan mat, og hjálparfelagsskapir ávarar um, at støðan kann gerast uppaftur verri, tí dagligu umstøðurnar hjá fólki eru versnaðar nógv í seinastuni.

Blaðið El Pais skrivaði um vikuskiftið, at umleið 220.000 børn, sum eru fødd hetta seinasta árið, hava fátæk foreldur, og at tey tí mugu haldast at vera í vanda. Tað svarar til 63 prosent av øllum børnunum, sum eru født í Argentina í ár.

## Harðligar kvinnur

Ofta hoyra vit um harðligar menn, og at kvinnur noyðast at rýma úr heiminum, tí menninir eru so harðligir við tær, men í Hongkong er myndin tann øvugta. Har hava myndugleikarnir fingið stórar trupulleikar av harðligum kvinnum.

Í 1998 fekk løgreglan í Hongkong 39 fráboðanir um, at kvinnur høvdu verið í so harðligar við menninar, men í fjør vóru fráboðanirnar 179 í tali, og hendan gongdin tykist standa við. Myndugleikarnir halda, at veksandi arbeiðsloysi er orsøkin til, at kvinnurnar eru vorðnar so harðligar við hjúnafelagan. Ein onnur orsøk er, at nógvar kvinnur í Hongkong eru vorðnar meiri sjálvstøðugar og seta manninum størri og størri krøv.

Men menninir í Hongkong eru nú heldur ikki Guðs bestu børn. Í fjør fingu myndugleikarnir meiri enn 2.000 fráboðanir um, at menn høvdu verið ov harðligir við konuna.

## Eingin er ímóti Ursulu

Eingin filmur um James Bond uttan minst eina vakra kvinnu, og nú um dagarvar varð kunngjørt eitt yvirlit yvir, hvørjar av teimum sonevndu Bond-gentunum eru tær best umtóktu millum teirra, sum halda av filmunum um Agent 007.

Kanningin vísti týðiliga, at tann nú 66 ára gamla Ursula Andress er tann, sum hyggjararnir halda mest av. Hon spældi í Bond-filminum "Dr. No" í 1962. Næst henni kom tann 31 ára gamla Denise Richards, sum spældi í filminum "The World Is Not Enough" fyri tveimum árum síðani. Fýra Bond-gentur mugu býta triðja pláss sínamillum. Tær eru Honor Blackman, Diana Rigg, Barbara Bach og Jane Seymour.

Tann 34 ára gamla Halle Berry hevur kvinnuliga leiklutin í nýggja Bond-filminum "Die Another Day".